# ítróttur

Nr. 155 • hósdagur • 18. august 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo

# So er FM á skránni

**Eftir at Svangaskarð mikukvøldið skuldi vera karmur um fótbóltslandsdyst, verður tað FM í frælsum ítrótti, sum stendur fyri tørni**

FRÆLSUR ÍTRÓTTUR
*Jákup Mørk*

FM-kappingin, sum er fyri vaksin, verður hildin sunnudagin, og verður farið undir fyrstu kappingarnar kl. 13.15.

Kappast verður í renning yvir 100, 400, 800 og 5000 metrar, og hartil verður eisini kappast í longdarlopi, trístøkki og kúluvarpi hjá bæði monnum og kvinnum.

Fyri at taka lut krevst, at tú ert limur í einum av teimum fýra feløgunum, sum hava frælsan ítrótt á skránni. Tað ber tó eisini til at tekna seg sum lim í einum av hesum feløgunum, tá tilmeldingin fer fram.

Á heimasíðuni, www.athletics.fo, verður sagt, at tilmelding eigur at fara fram í seinasta lagi leygarkvøldið. Kappingardagin er bert møguleiki at tekna seg til luttøku, um so er, at hetta ikki órógvar skránna, sum tá longu er løgd.




*Talan verður fyri tað nógva um renning, men eisini trístøkk, longdarlop og kúluvarp verða á skránni, tá FM-kappingin í frælsum ítrótti verður á Svangaskarði sunnudagin*

Tey trý fremstuu í hvørjari kappingargrein fáa heiðursmerki, og er tað í samstarvi við MBM, at hetta verður gjørt.

Annars verður eisini kappast í frælsum ítrótti leygardagin., Tá verður kapping á kastibreytini við Eysturskúlan í Havn. Á skránni eru tá FM í kasti í fimm-dysti og FM í vektkasti. Tilmeldingin til ta kappingina fer fram á staðnum beint undan kappingini.

# Standa í stað á listanum



Føroyska fótbóltslandsliðið hjá monnum er framvegis nummar 126 á styrkislistanum, sum FIFA almannakunngerð eina ferð um mánaðin.

Hetta er sama støðan, sum Føroyar høvdu á seinastu útgávuni av listanum, og yvir høvur ber hesin brá av, at sera fáir altjóða dystir hava verið spældir seinasta mánaðin, nú talan fyri tað nógv hevur verið um summarfrí.

Størsta broytingin millum fremstu londini er, at Frakland nú er dottið heilt aftur á eitt pláss sum nummar 9, eftir at teir fyri ikki so langari tíð síðani vóru klárt á odda á listanum. Tað plássið hoyrir nú aftur til Brasil, sum hevur eitt hampuliga stórt glopp niður til næstu liðini.

Seinasti styrkislistin hjá FIFA fyri august framgongur niðanfyri. Tølini í klombrum sýna, hvussu liðini vóru styrkismett í juli mánaði.

Føroysku kvinnurnar eru annar at finna á 70. plássinum á FIFA-listanum. Her fingu okkara ivaleyst nøkur stig, tá tær á oyggjaleikunum vunnu á Bermuda, men hvørja ávirkan hetta hevði, er enn ikki greitt. Styrkislistin fyri kvinnur verður dagførdur fýra ferðir um árið, og næsta útgávan av hesum er ikki almenn fyrr enn í september mánaði.

**-jm**

| nr | land |
|---|---|
| 1 (1) | Brasil |
| 2 (2) | Argentina |
| 3 (3) | Holland |
| 4 (4) | Kekkia |
| 5 (5) | Mexico |
| 6 (6) | USA |
| 7 (8) | Ongland |
| 8 (8) | Spania |
| 9 (7) | Frakland |
| 9 (10) | Portugal |
| 14 (14) | Írland |
| 15 (17) | Svøríki |
| 18 (19) | Danmark |
| 36 (36) | Noreg |
| 42 (42) | Sveis |
| 43 (43) | Finnland |
| 47 (48) | Ísrael |
| 94 (92) | Ísland |
| 105 (109) | Kypros |
| 126 (126) | Føroyar |

# Johan fær rós frá Everton

Ungi runavíkingurin, Johan Troest Davidsen, sum í fjør gjørdi sáttmála við enska Everton, fær góð skoðsmál, nú unglingaliðið hjá felagnum fyrireikar seg til komandi kappingarárið.

Hetta byrjar nú leygardagin, og eftir seinasta venjingardystin hevur heimasíðan hjá Everton bara rósandi orð at bera føroyska spælarunum.

Hóast hann enn einaferð var partur av verjuni, so er tað ikki minst fyri framrættaða partin í spælinum, at Johan verður róstur. Í fyrra hálvleiki var tað soleiðis hann, sum legði Everton á odda, tá hann stútaði hornaspark í kassan.

Og stutt eftir steðgin var tað eisini hann, sum var upphavið til 2-0 málið. Johan sendi tað, sum á heimasíðuni verður rópt fyri »a wonderfull ball« til ein liðfelaga longur frammi á vøllinum, og tá hesin varð feldur í leysari støðu, fekk Everton brotsspark.

Everton vann dystin 3-0, og sambært venjaranum, so var talan um besta avrikið í fyrireikingunum til nýggja kappingarárið. Her verður fyrsti dysturin so leygardagin, tá Reading er mótstøðuliðið.

**-jm**

## Toppskjúttin hjá Start skaddur

**Venjarin hjá Toda ber ótta fyri, at liðið nú kann fáa trupulleikar í endaspurtinum**

NOREG
*Jákup Mørk*

Tað kemur illa við hjá nýggja felagnum hjá Toda Jónsson, at Marius Johnsen nú er skaddur.

Hóast hann hevur fast pláss á vinstra bakki, so hevur Johnsen higartil í ár verið toppskjútti hjá felagnum við sjey málum. Ein støða, sum Todi Jónsson er í fullari ferð við at broyta.

Enn er ikki heilt greitt, hvussu álvarsamur skaðin er, men venjarin hjá Start, Tom Nordlie, ber ótta fyri, at hetta kann kosta nógv.

- Verður hann ikki við í komandi dystinum móti Odd Grenland og teimum næstu dystunum við, so sigur tað seg sjálvt, at tað kann hava keðiligar avleiðingar fyri liðið.

- Tað sigur seg sjálvt, at ein slíkur skaði kann nerva liðið. Ikki minst í verjupartinum, har hópurin framman undan er sera tunnur, sigur venjarin.

Og hjá spælarunum sjálvum er støðan ikki minni keðilig. Hann var annars úttikin til norska landsliðið, sum mikukvøldið skuldi spæla venjingardyst móti Slovenia. John Arne Riise er annars vanliga fastur fúsur á bakk-plássinum hjá Noreg, men hann er leikbannaður til komandi undankappingardystin móti Slovenia, og tí var ætlanin, at Johnsen skuldi roynast hesaferð. Men tann møguleikin verður so av ongum í hesum umfarinum.